FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Dagfesting: 24. juni 2019
Mál nr.: 19/00yyy
Málsviðgjørt: AL

Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um konjunkturjavnandi uppraðfesting av landsvegahaldi og umvæling av landsins bygningum

Uppskot til
løgtingslóg
um
konjunkturjavnandi uppraðfesting av landsvegahaldi og umvæling av landsins bygningum

§ 1. Fer arbeiðsloysið upp um 3,5% tríggjar mánaðir á rað verður landsstýrismanninum heimilað at uppraðfesta landsvegahald og umvæling av landsins bygningum.
Stk. 2. Árligu játtanirnar á komandi fíggjarlógum til landsvegahald skulu vera 20 mió. kr. hægri og umvæling av landsins bygningum skulu vera 40 mió. kr. hægri enn sambært játtanunum tað árið arbeiðsloysið fer upp um 3,5%.
Stk. 3. Í fíggjarárinum heimildin fæst at uppraðfesta landsvegahald og umvæling av landsins bygningum, skulu játtanirnar við eykajáttan hækka lutfalsliga í mun til nær í fíggjarárinum heimildin fæst.
Stk. 4. Fer arbeiðsloysið niðurum 3,5% tríggjar mánaðir á rað fellur í komandi fíggjarári burtur aftur heimildin hjá landsstýrismanninum at uppraðfesta landsvegahald og umvæling av landsins bygningum.
§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2029.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at fremja konjunkturjavnandi átøk sum viðvirka til, at virksemisstøðið í byggivinnuni verður hildið uppi, tá arbeiðsloysið hækkar og vandi er fyri, at lágkonjunkturur er ávegis.

Tískil verður uppskot til løgtingslóg lagt fyri Løgtingið, sum heimilar landsstýrismanninum, tá arbeiðsloysið 3. mánaðin á rað fer upp um 3,5%, at í komandi figgjarlógum upprøfesta játtanirnar til landsvegahald við 20 mió. kr. árliga og umvæling av landsins bygningum við 40 mió. kr. árliga.

Arbeiðsloysismarkið á 3,5% er sama mark, sum er ásett í aðrari lóg, og sum ger tað lættari hjá vinnuni at fáa útlendska arbeiðsmegi, tá arbeiðsloysið fer undir 3,5%.

Við hesum konjunkturjavnandi átøkum verður møguleiki hjá byggivinnuni at hava støðugari tal av lærlingum, tí meira arbeiði verður til teirra hendur. Við hesum fæst eisini, at hond verður tikin um eftirsleipið, tá umræður landsvegahald og umvæling av landsins bygningum.

Hartil er sannlíkt, at upprøfestingarnar til landsvegahald og umvæling av landsins bygningum við avleiddum virksemi eisini hjálpa til at halda virksemisstøðinum uppi í øðrum pørtum av vinnuni.

1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóggáva er á økinum.

1.3. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið byggir á trípartasamráðingar millum landsmyndugleikar, arbeiðsgevarar og løntakarar.

Lógaruppskotið hevur verið partur av tilgongdini at gera trípartasemjuna.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Í lógaruppskotinum eru konjunkturjavnandi átøk, sum eru viðvirkandi til, at virksemisstøðið í samfelagnum verður hildið uppi, tá arbeiðsloysið hækkar og vandi er fyri, at lágkonjunkturur er ávegis.

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið, sum bindur seg til at játtað 60 mió. kr. meira árliga til landsvegahald og umvæling av landsins bygningum tey árini arbeiðsloysið fer upp um 3,5%.

Landið og kommunur kunnu væntast at fáa avleiddar inntøkur av økta virkseminum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur jaligar beinleiðis avleiðingar fyri byggifeløg og onnur, sum fremja viðlíkahald og umvæling av landsins bygningum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, tí málið er, at orkunýtslan fyri umvældar bygningar bæði verður lægri og grønari.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum uttan tað, sum er nevnt omanfyri.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaliga ávirkan á næmingar, ið ynskja at taka yrkisútbúgving og skulu hava lærupláss. Annars hevur uppskotið ikki beinleiðis avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki týdning fyri millumtjóða sáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki týdning fyri tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

2.9. Marknaforðingar
Uppskotið elvir ikki til marknaforðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í § 1, stk. 1 verður heimilað landsstýrismanninum at upprøfesta landsvegahald og umvæling av landsins bygningum tá arbeiðsloysið fer upp um 3,5%.

Í stk. 2. verður upprøfestingin nágreinað, soleiðis at árligu játtanirnar á komandi fíggjarlógum til landsvegahald skulu vera 20 mió. kr. hægri og umvæling av landsins bygningum skulu vera 40 mió. kr. hægri enn sambært játtanunum tað árið arbeiðsloysið fer upp um 3,5%.

Í stk. 3. verður ásett, at í fíggjarárinum heimildin fæst at upprøfesta landsvegahald og umvæling av landsins bygningum, skulu játtanirnar við eykajáttan hækka lutfalsliga í mun til nær í fíggjarárinum heimildin fæst.

Í stk. 4. verður ásett, at fer arbeiðsloysið niðurum 3,5% tríggjar mánaðir á rað fellur í komandi fíggjarári burtur aftur heimildin hjá landsstýrismanninum at upprøfesta landsvegahald og umvæling av landsins bygningum.

Til § 2
§ 2 ásetur gildiskomu, og nær lógin fer úr gildi.

Ein slík heimildarlóg eigur at hava eina úrgildiskomu ásetta. Lagt verður upp til lógin fær gildi í 10 ár, og fer sostatt úr gildi 31. desember 2029.

Fíggjarmálaráðið, 24. juni 2019

Kristina Háfoss
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason